# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Onkur skal gjalda gildið

Um jólini hoyrdu vit løgmann í útvarpinum boða frá, at vit mugu rokna við avgjaldshækkingum – eitt nú á brennievni – til tess at útvega landskassanum neyðugar inntøkur, nú fíggjarlógin gevur hall upp á eina slaka milliard krónur. Landsbankastjórin róði framundir, at ein møguleiki er, at allir skattir hækka tvey prosent. Men tað heldur løgmaður ikki verða rætt. Hinvegin kunnu vit við globalu verðurlagsstøðuni í huga nikka játtandi til, at ein króna verður løgd oman á olju og bensin, tí vit eiga jú at hugsa grønt um orku.

Enn hava vit ikki frætt, hvørja hugsan fíggjarmálaráðharrin hevur til hetta hugskot løgmans. Men formaður Fólkafloksins hevur longu skotið hesa ætlanina í senk. Tað kemur ikki upp á tal, so leingi Fólkaflokkurin situr í landsins stjórn, at skattir og avgjøld hækka, er greiði boðskapurin frá Jørgeni Niclasen.

Ókey. Fíggjarlógin hongur ikki saman. Landsstýrissamgongan megnaði ikki at finna neyðugu bygnaðarligu sparingarnar. Skattirnir skulu ikki hækka, og avgjøld skulu ikki hækka. Blokkstuðulin skal heldur ikki hækka – ella tiðnast uppaftur til prístalsregulering.

Veljarin spyr tí, hvussu hetta skal hanga saman, og um høgra hond veit, hvat vinstra ger. Tað tykist heldur ikki, sum um andstøðan hevur nakað alternativ. Onkur tosar um bjargingarstjórn, onnur um fullveldi – í báðum førum flosklar, sum einki hava við tann veruliga trupulleikan at gera.

Tað skerst heldur ikki burt, at fullveldissamgongan skar triðingin av ríkisveitingini burtur í óðum verkum. Uttan at nakað ítøkiligt varð gjørt fyri at útvega samfelagnum aðrar alternativar inntøkur, so varð blokkurin skorin niður – og enn pástanda tey, at hetta fer at skapa vøkstur. Javell, kann veljarin siga. Men tá tú sker eina so stóra milliióna inntøku, sum eitt samfelag fær inn íbúskapin »fyri einki« og so vænta, at tað ongar avleiðingar fær, tað kann valla vera annað enn naivt.

Men okkurt skal gerast. Blokkurin er skorin, og inntøkurnar eru minkandi. Tað minsta vit kunnu krevja av samgonguleiðarunum er, at teir tosa sama mál, ella er einki skil í. Landsstýrissamgongan má hava eina felags meining um, hvørt skattir skulu hækka, um avgjøld skulu hækka, ella velja onkrar tænastur ella dupultfunktiónir burturúr, sum vit ikki skulu hava í framtíðini. Onkur skal gjalda gildið...

**Sosialurin**

## Kristus

RICHARD DANIELSEN



**Matteus sigur soleiðis frá um føðing Krists:**

**"Við føðing Jesu Krists gekk so til: Maria, móðir Hansara, var trúlovað við Jósefi; men áðrenn tey komu saman, royndist hon at vera við barn við Heilaga Andanum. Men við tað at Jósef, maður hennara, var rættvísur og vildi ikki gera hana til skammar fyri almenningi, ætlaði hann loyniliga at skiljast frá henni. Meðan hann nú hugsaði um hetta, vísti eingil Harrans seg fyri honum í dreymi og segði: "Jósef, sonur Dávid! Óttast ikki at taka til tín Mariu, konu tína! Tí tað, sum í henni er gitið, er av Heilaga Andanum. Hon skal eiga son, og tú skalt kalla navn Hansara Jesus; tí Hann skal frelsa fólk Sítt frá syndum teirra." Alt hetta hendi, fyri at tað skuldi ganga út, sum talað er av Harranum við profetinum, sum sigur: "Moyggin skal verða við barn og eiga son, og navn Hansara skal verða kallað Immanuel" - sum útlagt er: "Gud við okkum." Táið nú Jósef var vaknaður upp úr svøvni, gjørdi hann, sum eingil Harrans hevði álagt honum, og tók til sín konu sína; men hann helt seg ikki til hennara, fyrrenn hon hevði átt son sín. Og hann kallaði navn Hansara Jesus."**

Tað eru teir ið royna at burturforklára, at føðing Jesusar var yvirnáttúrlig. Teir halda seg vera so klókar, og siga at tað kann ikki bera til at verða føddur, uttan baði maður og kvinna eru uppi í leikinum, men teir fara stórliga villir.

Tað var harafturímóti ómøguligt, at hendan føðingin kundi fara fram uttan á tann hátt, sum Matteus greiðir frá. Tað var nevniliga lovað heilt frá urtíðini, at ein Frelsari skuldi føðast. Eitt lyfti var givið Ábrahami um, at í avkomi hansara skuldu allar ættir á jørðini verða signaðar. 1. Mós. 12,1-3. Paulus tekur til tað í brævinum til galatiasamkomuna og sigur, at tað var Kristus talan var um. Ábraham fekk hetta endurtikið tvær ferðir, og Ísak sonur hansara fekk lyftið einaferð, somuleiðis Jákup abbasonurin. Síðani síggja vit gjøgnum skriftirnar profeti og myndir um Frelsaran, sum skuldi koma.

Jesus tekur tað sjálvur fram eftir uppreisn sína, tá ið hann var komin í fylgi við tveir av lærisveinum sínum, sum vóru á veg úr Jerúsalem til Emmaus. Hann sigur soleiðis:

**"Hann byrjaði nú frá Mósesi og frá øllum profetunum og útlegði fyri teimum tað, sum í øllum skriftunum var sagt um Hann." Luk. 24,27.**

Mika Profetur sigur hetta:

**"Men tú Betlehem, Efrata, sum so lítið hevur at týða til at vera millum túsund Juda! Úr tær skal ein ganga Mær út, sum skal vera høvdingi Ísraels. Uppruni Hansara er úr forðum, frá fortíðardøgum." Mika 5,1.**

Uppruni Hansara er úr forðum. Altso ikki eitt vanligt menniskja. Tað sigur seg sjálvt. Um Jósef var pápi Jesusar, so var Jesus bara eitt vanligt menniskja og kundi sjálvandi ikki frelst nakran, heldur ikki seg sjálvan. Men hann var ikki eitt vanligt menniskja. Hann var menniskjasonur, sonur Mariu, sum var gitin av Heilagum Anda. Hann er sonur Guds og sigur einastaðni soleiðis um seg sjálvan:

**"Jesus segði við teir: "Sanniliga, sanniliga, sigi Eg tykkum: Áðrenn Ábraham varð til, eri Eg!"" Jóh. 8,58.**

Legg til merkis hvat hann sigur: "Eri Eg"! Hetta er tittulin, sum Gud brúkar um seg. Hann sigur við Móses í 2. Mós. 3,14: " So skalt tú siga við Ísraelsmenn: "Eg Eri" hevur sent meg til tykkara!""

So, fyri at koma aftur til byrjanina: Teir sum ikki trúgva tí, sum Matteus sigur frá um føðing Jesusar, fara heilt skeivir. Tað kann bara vera hent á tann hátt. Siga vit nakað annað, so mugu vit ásannað, at vit hava kastað allan lærdóm bíbliunar frá okkum. Tí, sum longu sagt, øll Bíblian er um Jesus Kristus. Hetta er sjálvt miðdeplið í sonnum kristindómi: **"Trýrt tú at Jesus er Sonur Guds ella ikki."**

**"Hvør er lygnarin, uttan tann, ið noktar, at Jesus er Kristus! Hesin er Antikristus - hann, ið avnoktar Faðirin og Sonin." 1. Jóh. Br. 2,22.**

Stytsta dag 2009

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Lesið Sosialin - so eru tit við


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo
Svein Rógvi Nielsen Ljósstein sveinrogvi@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.